# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ingeborg Vinther 60

Hon hevði ikki fylt 35 ár, tá hon settist í formansstólin í Føroya Arbeiðarafelag, og har hevur hon sitið síðani. Uttan tá hon hevur staðið úti á barrikadunum, og tað er ikki so sjáldan.

Mikudagin 11. mai fyllir hon 60, Ingeborg Vinther. Hon varð født í Vági í 1945, dóttir Mariu Jacobsen av Glyvrum og Meinar Joensen úr Vági, og hon er gift við Andru Vinther.

Hon arbeiddi sum flakakvinna í Føroyum og Íslandi 1964-84. Síðani fekk hon sær útbúgving í skipanarleiðslu á Arbeiðaraháskúlanum í Danmark árini 1978-82. Haraftrat fekk hon sær ped. útbúgving sum skeiðsleiðari á Kystgården í 1982.

Eisini hevur hon verið uppi í politikki. Hon var ein av fakfelagsleiðarunum, sum stillaðu upp fyri Verkamannafylkingina í 1994 og varð vald sum tingkvinna fyri Suðuroynna. Hon var í tinginum í 4 ár, men tað kom vátt í reiðrið millum hana og hin sterka fakfelagsleiðaran, Óla Jacobsen, við tí avleiðing, at Verkamannafylkingin klovnaði. Hvørki teirra stillaði uppaftur á valinum í 1998.



Kendast er Ingeborg sum fakfelagsleiðari. Fakfelagsarbeiði var henni ikki ókunnugt, tí pápin var nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag í 10 ár. Hon kom í nevndina fyri Føroya Arbeiðarafelag í 1977, meðan Johannes Olsen úr Sandavági framvegis var formaður. Longu 3 ár seinni, í 1980, varð hon vald til formann.

Tað merkti eitt skifti í fakfelagspolitikkinum hjá Føroya Arbeiðarafelag. Johannes Olsen var spakur maður, sum fekk nýggjar sáttmálar í lag uttan stórvegis hóvastak ella verkfall. Ingeborg var meira braneggjað og stýrdi við harðari hond. Tað man hava verið væl dámt í felagnum, tí øll hesi árini, hon hevur verið formaður - 25 ár fyri kortum - hevur ongin stillað upp ímóti henni, tá formansval hevur verið.

Umsitingin er vaksin í hennara tíð. Tá hon tók við, vóru tvey fólk í starvi á skrivstovuni, sum hevði opið tvær ferðir um vikuna. Nú eru 4 fulltíðarstørv, og skrivstovan er opin hvønn dag. Nevndarfundir plagdu at vera tvær ferðir um árið, nú er fundur hvønn mánað ella oftari.

Í samrøðu við Sosialin fyri stuttum segði Ingeborg Vinther, at nú tekur felagið sær eisini av øðrum enn løn, eitt nú sosialum skipanum, trygd og trivnaði á arbeiðsplássinum. Samskiftið við fakfeløg úti í heiminum er nógv vaksið, og Ingeborg Vinther og onnur ferðast nógv fyri Føroya Arbeiðarafelag.

Konufólk fingu fulla løn, tá tey vóru fylt 16, mannfólk tá tey vóru fylt 17, men mannfólk fingu meira um tíman. Spurningurin varð tikin upp í 1977, tá Ingeborg leiddi samráðingarnar fyrstu ferð. Tað endaði við, at partarnir góðtóku eitt semingsuppskot frá Jógvani Sundstein um, at eftir fýra árum skuldu konufólk fáa somu løn sum mannfólk, og samstundis skuldi aldurin fyri, nær tey fingu fulla løn, hækkast til 17 ár.

Mong verkføll hava verið, meðan Ingeborg hevur verið formaður. Sjálv sigur hon, at tað harðasta verkfallið var í 1987. Tað varði í 3 vikur.

Sum formaður í Føroya Arbeiðarafelag hevur Ingeborg Vinther eisini havt onnur álitisstørv, millum annað sum limur í umsjónarráðnum fyri Landsbankan.

## Jóhan Vang 60 ár

Í dag, mikudagin 11. mai, fyllir Jóhan Vang í Havn 60 ár. Jóhan hevur í mong ár verið handilsmaður í høvuðsstaðnum.

Foreldrini hjá Jóhan vóru Jóhanna ella Diddan, sum hon varð nevnd, og Niels Vang. Hon var úr Skemmuni í Porkeri, og hann var úr Gørðum í Kaldbak. Diddan og Niels Vang fingu tveir synir. Óli, sum eisini býr í Havnini, er sjey ár eldri enn Jóhan.

Óli var føddur í Klaksvík, og Jóhan var føddur nakrar mánaðir eftir, at tey vóru flutt til Havnar at búgva. Í Klaksvík búði Niels Vang í trettan ár, og tá ið hann giftist við Didduni, bygdu tey húsini, sum standa dygst norðanfyri Ósáskúlan. Niels arbeiddi í trý ár hjá Kal, og í tíggju ár var hann fyristøðumaður í krambúðini hjá Kjølbro á Biskupsstøð.

Í Havnini bygdu tey fyrst húsini úti í Grønlandi, sum Sigurð Joensen, sakførari, seinni átti. Niels Vang var handilsmaður í Havnini. Hann arbeiddi fyrst hjá Mariu Poulsen, sum hann átti saman við øðrum. Síðani fór hann í holtur við matvøruhandil á Ingetrøð.



Har leigaði hann kjallara til handil, og síðani keypti hann grannahúsini, sum familjan fyrrapartin av fimti árunum búsettist í.

Tá ið Jóhan var liðugur við realskúlan, fór hann at hjálpa pápanum, og síðani hevur hann mest sum alla tíðina verið handilsmaður. Eitt ár í seksti árunum var hann á handilsskúla í Keypmannahavn.

Jóhan gekk undan, tá ið krambúðin hjá Niels Vang fyri einum 35 árum síðani bygdi nýggjan bygning á grundøkinum, har handilin og sethúsini høvdu verið, og í hølunum, sum eru aftanfyri Auto, høvdu teir í sjeyti árunum ein tann størsta matvøruhandilin í høvuðsstaðnum.

Tá ið handilsmynstrið broyttist nógv í Havnini, gavst Jóhan við matvøruhandlinum. Eitt skifti hevði hann barnaútgerð, men so fóru hann og konan í holtur við barnaklædnahandilin, sum tey nevndu Daddan. Eina tíð vóru tey í SMS. So vóru tey aftur á Ingetrøð, og nú hava tey í fleiri ár havt stóran og kanska tann størsta barnaklædnahandilin í landinum uppi á Hálsi.

Jóhan luttók í nevndararbeiðnum í Havnar Detailhandlarafelag, og hann var eisini í fleiri ár nevndarlimur í Havnar Framburðsfelag, sum er valfelagið hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymi. Í 1972 var hann uppstillaður til býráðsvalið. Honum restaði eina atkvøðu í at verða valdur. Jóhan var okkurt skifti í býráðnum sum eykamaður, men í 1976 stillaði hann ikki uppaftur.

Í eina fjórðingsøld vóru Jóhan og konan í sangkórinum í Ebenezer, har Jóhan eisini var sunnudagsskúlalærari í upp móti tredivu árum.

Jóhan Vang giftist í 1970 við Honnu í Túni av Toftum. Tey bygdu í Stoffalág, har tey framvegis búgva í hugnaligum heimi, sum altíð hevur verið eyðkent av stórum gestablídni.

Hanna og Jóhan eiga fimm børn: Niels, føddur í 1971, er giftur við Miriam, sum er dóttur Jonnu og Hans Sivertsen í Nuuk. Tey búgva í Eysturgrønlandi, har tey eru trúboðarar. Júst, sum er føddur í 1973, arbeiðir hjá Statoil. Hann er giftur við Katrin, sum er ættað úr Vatnsoyrum. Eva, sum er fødd í 1977, er gift við Jákupi Klein úr Vatnsoyrum. Tey búgva í Havnini, og Eva er pedagog. Maria, sum er fødd í 1979, er í Keypmannahavn, har hon lærir til fysioterapeut. Rebekka, sum er fødd í 1987, býr heima hjá foreldrunum, og hon gongur í Hoydølum. Jóhan eigur sjey abbabørn - tveir dreingir og fimm gentur.

60 ára føðingardagin er Jóhan burturstaddur.

**Dagurin**
**11. mai, Mamertus**, deyður í 475. Biskupur í Suðurfraklandi; tikin av døgum.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri vístan heiður á mínum 65 ára føðingardegi 24. apríl 2005. Takk fyri heilsur, blómur og gávur.

Eisini takk fyri gávur til merkisdagin 1. apríl og øll tit mongu, ið vóru inni og heilsaðu uppá.

**Heilsan**
**Solveig Nolsøe Johansen, Vágur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Jákup Pauli Georg Joensen**
**Hvalvík**
Vanliga nevndur Palli

andaðist og varð borin til hvíldar.

Takk til Bergur Joensen, prest, fyri vøkur og troystarrík orð í kapellinum og til Marjun Bech, prest, í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og Theodor Petersen.
Takk til starvsfólkið á G4 á Landssjúkrahúsinum.
Takk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við ervið.
Takk fyri kransar, blómur og gávur til G4, og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Kona og børnini við familju**

†

Kunnað verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri

**Jørgen Kreisø**

andaðist í heiminum 2. mai, 50 ára gamal.

Farið verður frá heiminum á Falster Aastrupvej 51, 4850 Stubbekøbing, 14. mai kl. 12.00.

Verður jarðaður á Assistens Kirkegaard í Keypmannahavn kl. 13.45.

*Familjunnar vegna*
**Natascha**